## *10. grein Ásetingar fyri øki A: Miðstaðarendamál.*

1. Øki verður lagt av til miðstaðarbygging, t.e. handlar, skrivstovur, samkomuhøli, heilsubótarstovur, gistingarhús, matstovur, smærri handverksfyritøkur o.t. Byggivaldið kann geva loyvi til at innrætta íbúð til virkiseigara ella starvsfólk.
2. Nettonýtingarstigið má ikki fara upp um 0,7.
3. Bygningar kunnu í mesta lagi verða bygdir í 2 hæddum umframt lofti og skulu annars ikki vera hægri enn 9 m til yvirgrindina og 12 m til mønuna mátað frá miðaljørðildi (í miðal við húsarhornini). Kjallari verður roknaður uppí sum húsa-hædd, um so er, at loftið er meira enn 1 m yvir hægsta jørðildi við húsahorn. Bert ein kjallari má vera.
4. Frávik kunnu verða gjørd frá ásetingunum í 2. og 3. stk. í serstakari byggisamtykt fyri hóskiligt, náttúrliga avmarkað øki. Tó kann nettonýtingarstigið fyri økið sum heild ikki fara upp um 1,0.

## *Ásetingar fyri øki A2: Miðstaðarendamál.*

1. Øki verður lagt av til miðstaðarbygging, t.e. handlar, skrivstovur, samkomuhøli, heilsubótarstovur, gistingarhús, matstovur, smærri handverksfyritøkur, íbúðarbygging o.t. Byggivaldið kann geva loyvi til at innrætta íbúð til virkiseigara ella starvsfólk.
2. Nettonýtingarstigið má ikki fara upp um 0,7.
3. Bygningar kunnu í mesta lagi verða bygdir í 2 hæddum umframt lofti og skulu annars ikki vera hægri enn 9 m til yvirgrindina og 12 m til mønuna mátað frá miðaljørðildi (í miðal við húsarhornini). Kjallari verður roknaður uppí sum húsa-hædd, um so er, at loftið er meira enn 1 m yvir hægsta jørðildi við húsahorn. Bert ein kjallari má vera.
4. Frávik kunnu verða gjørd frá ásetingunum í 2. og 3. stk. í serstakari byggisamtykt fyri hóskiligt, náttúrliga avmarkað øki. Tó kann nettonýtingarstigið fyri økið sum heild ikki fara upp um 1,0.